# Skipsinspektørur til Strandfaraskip Landsins

Ert tú neyvur og álítandi? Hevur tú fokus á útreiðslur, trygd og umhvørvi?
Trívist tú við at hava nógv at gera?



Strandfaraskip Landsins sóknast eftir einum skipsinspektøri at byrja sum skjótast. Tú kemur at arbeiða á rakstrardeildini, ið hevur ábyrgdina av rakstrinum av øllum skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins.

**Starvið**
Skipsinspektørurin stendur fyri umsjónini og eftirlitinum við skipunum hjá Strandfaraskipum Landsins. Tú skalt samskipa, leggja til rættis og fylgja viðlíkahaldi av skipum, skipa fyri umvælingum og seta skip í dokk.

Skipsinspektørurin tekur sær av teknisku ráðgevingini til skipsleiðsluna, og hann skal syrgja fyri, at formligu ásetingarnar, trygdarútgerð og siglingarloyvi eru í lagi.

**Umsøkjarin**
Tú ert útbúgvin markinsverkfrøðingur ella hevur í minsta lagi 3 ára útbúgving sum maskinmeistari, og tú hevur kunnleika til viðlíkahaldsskipanir og royndir við skiparakstri. Vit leggja dent á, at tú hevur fokus á rakstrarútreiðslur, trygd og umhvørvi.

Vit rokna við, at tú dugir at brúka tekstviðgerð, rokniark og dátabasu, og tað er ein fyritreyt, at tú hevur góð evni at orða teg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum og enskum. Vit vænta, at tú ert lættur at samstarva við, tolir broytingar og ert vanur at hava nógv um oyruni samstundis.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi og ábyrgdarfult starv, har góður møguleiki er fyri menning. Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi við samstarvssinnaðum starvsfelagum, og arbeiðsdagurin er mangan fjølbroyttur. Lønar- og setanarviðurskiftini verða skipað sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Setan og umsókn**
Starvið verður sett skjótast gjørligt. Tú fært meira at vita við at seta teg í samband við Regin Vágadal, rakstrarleiðara, tel 34 40 00 ella t-post rev@ssl.fo

Umsókn við próvskjølum verður í seinasta lagi 22. mai at senda til:

Strandfaraskip Landsins
Att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

Ella t-post: pah@ssl.fo

sansir.fo

Strandfaraskip Landsins fevna um Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir, sum skulu lúka landsins tørv á fólkaflutningi. Fyritøkan skal mest gjørligt rekast á handilsligum grundarlagi. Stórar broytingar eru hendar á Strandfaraskipum Landsins seinnu árini, og víðfevndar menningarætlanir liggja fyri stavn. Millum hesar kann nevnast ein framhaldandi uppstiging og endurnýgging av tænastukervinum á sjógvi og landi.

STRANDFARASKIP LANDSINS

---

Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.

STARV

# BÚSKAPARFRØÐINGUR Á HAGSTOVUNA

## Hagstovan søkir eftir einum búskaparfrøðingi til at standa fyri hagtølunum um gjaldsjavna og uttanlandsskuld.

**Ábyrgd**
Búskaparfrøðingarnir á Hagstovuni eru eitt toymi, sum arbeiðir tætt saman í felags arbeiðsætlan, har hvør einstakur kortini hevur sínar ábyrgdir.
Uppgávan er at vera partur av toyminum um tjóðarroknskapin, at hava ábyrgdina av uppgerðunum av gjaldsjavna og uttanlandaskuld, at stíla fyri innsavningini og viðgerðini av upplýsingum, at fremja uppgerðina sambært altjóða forskriftum og at kunngera úrslitini.

**Førleikar**
Vit sóknast tí eftir einum akademiskt útbúnum búskaparfrøðingi, við áhuga fyri tjóðarbúskapi og hagtølum sum heild. Uppgávan krevur góðan kunnleika til vinnuligu viðurskiftini í landinum og samstundis krevjast góðir førleikar til hagtalsliga viðgerð av innheintaðum upplýsingum.

Haraftrat vænta vit, at tú hevur royndir av fakligum analytiskum arbeiði, sum seta teg føran fyri at geva sjálvstøðugt íkast til menningina av týðandi informasjón um samfelagsbúskapin. Vit vænta eisini, at tú hevur evnini at gera torfør mál einføld hjá øðrum at skilja, so at tú lættliga kannst samstarva við tøknideildina, samstarvs-felagar annars og eisini dugir at greiða frá fløktum viðurskiftum á ein lættfatiligan hátt.

Góð samstarvsevni og ein positivan hugburð til uppgávuna leggja vit stóran dent á. Á Hagstovuni telja fólk, men fyri okkum eru tað fólkini ið telja.

**Starvið**
Starvið er fultrúastarv á Hagstovuni og verður samsýnt við løn sambært galdandi sáttmála millum Búskapar- og Løgfrøðingafelag Føroya og Landsstýrið.

Umsóknarfreistin er 15. mei 2005, tá skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi. Vilt tú vita meira um starv, treytir og arbeiðspláss, ring so til Hermann Oskarsson ella John Jacobsen á telefon 35 28 00.

TEAM85

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO

Sosialin
-so eru tit við!